# Norðurlandameistaraheitið í ungum jassi í Norðurlandahúsinum

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Leygardagin 10. sept. kl. 13.00 verður kappingin fyri ungar jassbólkar YNJC í Norðurlandahúsinum. YNJC hevur seinastu seks árini verið uppá skift í øllum teimum norðurlendsku høvuðstøðunum, og verður kappingin í ár í Tórshavn,

Kappingin er fyri bólkar har allir limir eru undir 26. ár. Kappingin er skipa soleiðis, at hvør bólkur spælir í 25 min, og síðan meta tríggjir dómarar um hvør framførslu var best. Vinningurin er ein tónleikarundferð í Norðurlondum.

Luttakandi bólkarnir eru:
Stryknin, Ísland
JassKamikaze, Danmark
Listen, Noreg
Ben-Jammin, Føroyar
Sound of the Millenium, Svøríki
Reactor-5, Finland
Jassvanten, Áland

Tey størri londini hava í farna árinum havt innleiðandi umfør, har lokali vinnarin so umboðar landið á konsertini í Norðurlandahúsinum. Tey smærru londini velja ofta út bólkar at umboða seg, og soleiðis hevur eisini verið við tí føroysku luttøkuni.

Undanfarnu árini hava føroyskir bólkar verið við á hvørjari finalu. Av tónleikarum sum hava luttikið fyri Føroyar, kunnu nevnast Búi Dam, Heðin Z. Davidsen, Brandur Jacobsen, Mikael Blak, Dánjal á Neystabø, og mangir aðrir. Føroyski bólkurin í ár, Ben-Jammin, er mannaður við evnaríkum tónleikarum:



*Ben-Jammin umboða Føroyar í kappingini*

YNJC er tað besta, sum Norðurlond hava at bjóða innan jass undir 26 ár, og støðið er sera høgt og víttfevnandi, – líka frá reinum jassi til tað rokkuta. YNJC verður fyriskipað av Jassforbundunum hjá teimum størri londunum, saman við jass- áhugafeløgum í teimum smærri londunum. Ókeypis atgongd er til konsertina.

### Ben-Jammin stovnaðir til endamálið

Vit vilja ordiliga gjarna vinna eina tónleikarundferð, tí her heima ganga vit og keða okkum sigur Benjamin Petersen, lagskrivari og gittarleikari í Ben-Jammin

### Tónleikakapping

Ben-Jammin er ein ungur jassbólkur úr Føroyum, ivaleyst tann einasti ungi jassbólkurin í Føroyum, og bólkurin hevði ikki verið til, var tað ikki tí YNJC skuldi vera. Ólavur Olsen hevur heitt á teir fýra, ið manna bólkin, um at luttaka í kappingini. Teir spæla allir til dagligt í Tórshavnar Big Band og kennast væl. Tí byrja teir ikki á berum.

Benjamin Petersen er gittarleikari í bólkinum og hevur somuleiðis skrivað øll løgini. Hann kallar stílin fyri eksperimentarandi melodiskan jass. Benjamin gjørdist kendur í Føroyum, sum tann ótrúliga gávuríki ungi gittarleikarin hjá Brandi Enni. Hann hevur síðan tíðina við Brandi mest fingist við jass eitt nú saman við Arnoldi Ludvíg og Brandi Jakobsen.

Umframt Benjamin er trummu- og ásláttursleikarin Jan Rúni Poulsen, og teir báðir blásararnir Tróndur Olsen, trompet og Dávur Juul Magnussen, trombone. Tróndur spælir í gerandisdegnum ljómborð og trompet í Lama Sea og er saman Dávi ein partur av blásisektiónini í Lawetz. Jan Rúni hevur royndir úr Havnar Hornorkestri.

Limirnir í bólkinum plaga ofta at spæla saman til jam session á Manhattan, og eru allir væl. Samansetingin av bólkinum er eitt sindur annarleiðis. Vanahugsanin spyr, hvar bassleikarin er. Benjamin sigur, at hann veit væl, at hetta er eitt sindur løgið. Men teir kendu ongan bassleikari í rætta aldursbólki, sum spælir jass. Í øllum førum ikki nóg væl. Teir hava bara vænt í eina góða viku, og tí mettu teir tað ikki ráðiligt at taka onkran nýggjan ókendan faktor inn í teirra eind, tað skal jú arbeiðast skjótt. Benjamin heldur fram, at hetta heldur ikki er neyðugt í hesum samanhangi, tí tað ljóðar væl uttan bass.

Teir eru øgiliga spentir til konsertina í morgin. Benjamin sigur, at tað hevði verið ótrúliga deiligt at sloppið at ferðast við tónleiki runt í Norðurlondum, tí her heima ganga teir og keða seg.

# Gåte gevst

**Gunnhild Sundli orkar ikki longur, og fer burturúr norska rokkbólkinum Gåte. Bólkurin velur tí fyribils at gevast aftan á seks ár saman. Men hetta nýtist ikki at vera endin, siga limir í bólkinum.**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Norski bólkurin Gåte, sum tvær ferðir hevur vitjað í Føroyum gevst. Sangarinnan Gunnhild Sundli orkar ikki longur, og vil royna okkurt nýtt. Hetta sigur hon við norska blaðið VG.

Gunnhild er 20 ár, hon hevur sungið í Gåte, síðan hon var 14 ár. Nú vil hon standa á egnum beinum. Hon sigur, at tað verður deiligt, ikki longur at skula arbeiða saman við beiggja sínum og sjeikinum, og gleðir seg til at fáa eitt vanligt forhold til teirra. Beiggi Gunnhild, Sveinung Sundli spælir violin og ljómborð í Gåte, og sjeikurin Magnus Børmark er gittarleikari í bólkinum.

Gåte spældu á G! 2004, og vóru ein av jaligastu upplivingunum hetta árið. Tey vóru av nógvum sammett við Clickhaze, nokk mest tí hetta er ein rokkbólkur við eini framúr góðari og sera ungari songkvinnu, sum tolkar gamlar vísir og fólkatónleik.

Bólkurin var í vár aftur og vitjaði í Føroyum. Tá tey spældu konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði saman við Knút Háberg Eystur-stein, Makrel og Lama Sea.

Seinastu seks árini hevur Gåte spælt 350 konsertir, luttikið á teimum størstu festivalunum í Norðan Londum, og útgivið tvær vælumtóktar fløgur, ið eru seldar í 84.000 eintøkum.

Gåte hevði júst fingið avtalu í lag við Warner í Týsklandi, men hetta verður nú av ongum. Avtalan var annars størsta gjøgnumbrotið í søguni hjá bólkinum. Ætlanin var at brúka Týskland sum lopfjøl til at gerast eitt kent navn í øllum Evropa.

Sveinung sigur við VG, at hann væl skilur systur sína, fyri framman lá sera nógv og strævið arbeiði, og um øll ikki eru til reiðar til hetta, so riggar ikki. Hann sigur samstundis, at tað ber ikki til at halda fram við Gåte uttan Gunnhild.

Gunnhild hevur ikki sum er konkretar ætlanir um at fara at virka sum einstaklingur. Fyribils fer hon at royna seg sum sjónleikara í Korsvikaspelet í Tróndheim. Hon sigur, at stigið at gevast í Gåte er neyðugt fyri hennara menning. Hon kennir tað, sum um hon nú, sum 20 ára gomul, er komin í pubertetin. Í Gåte var alt trygt, nú vil hon taka nakrar tjansir.

Bæði Gunnhild og Sveinung siga við VG, at tey velja at síggja hetta sum ein steðg heldur enn endan á bólkinum, á hendan hátt er lættari at byrja aftur, um áhugi verður fyri tí. Bólkurin sigur, at tey ætla at halda eina farvæl konsert, men enn er ikki avgjørt nær og hvar.

## Løgmaður vitjar í Suðuroyggjum

**Jóannes Eidesgaard, løgmaður, er farin til Suðuroyggjar. Har skal hann hitta ráðsformenninar fyri Hetland, Orkunoyggjar og Suðuroyggjar**

– Sum oyggjalond hava hesi fýra samfeløgini nógv í felag, og tí er tað skilagott javnan at hittast at geva hvørjum øðrum hugskot og íblástur, og at kjakast um mál av felags áhuga, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann fer á ferðini millum annað at kunna ráðsformenninar í Hetlandi, Orkunoyggjum og Suðuroyggjum um framstigini, Føroyar hava gjørt í viðurskiftunum við Danmark við uttanríkispolitisku heimildarlógini og við yvirtøkulógini.

Løgmaður og ráðsformenninir fara millum annað at umrøða teletøkni og alternativa orkuframleiðslu, so sum alduorkuverk.

Øki, ið tey fýra oyggjasamfeløgini hava felags áhuga í, eru millum annað alivinna, orkuframleiðsla úr varandi orkukeldum, oljuvinna, undirstøðukervi, mentan, ítróttur og umsiting av havsins tilfeingi.

Fyrsti fundur av hesum slag millum Føroyar, Hetland, Orkunoyggjar og Suðuroyggjar var í Føroyum í fjør summar.